# Nógv lænt og lisið í miðdeildini

Nám hevur 188 flokssett, sum eru væl egnað til miðdeild, og fleiri teirra verða lænt ofta

Tekstur og mynd: Turið Kjølbro

**SAMRØÐA.** Á lærugreinadegi, sum Nám skipaði fyri 22. februar fyri lærarum í føroyskum í miðdeild, røddi Lis G. í Jákupsstovu, bókavørður á Námi, um flokssett, sum stovnurin hevur til næmingar í miðdeild. Nám hevur flokssett til allar deildirnar í fólkaskúlanum, tó mest til miðdeildina, ikki færri enn 188 í tali.

– Lærarar hugsa nógv um at stimbra lesingina og fáa glið á lesingina, og tí verður nógv lisið í miðdeild. Nógvir lærarar vilja hava næmingarnar at lesa 20 minuttir um dagin; hjá nógvum ráða næmingarnir sjálvir fyri, hvat ið verður lisið hesar 20 minuttirnar, meðan aðrir lærarar vilja hava næmingarnar at lesa somu bók, sigur Lis G. í Jákupsstovu.

### Nýtt og gott gamalt

Hyggja vit at uppgerðunum yvir bøkur, sum lærarar læna til næmingar sínar í miðdeild, eru vanliga 5 av teimum 10 mest læntu bókunum nýggjar bøkur. Í 2016 lá bókin, *Rani - ein nýggj byrjan*, eftir Ingun Christensen ovast á listanum yvir læntar bøkur í miðdeildini; hon kom út í 2014. Næst eftir henni kom *Brennivargurin* eftir Jógvan Isaksen; henda bókin er frá 1991. Trið á listanum var *Rani – vár og vónir*, sum er framhald av *Rani – ein nýggj byrjan*; hon kom út í 2015.

– Bøkurnar um Rana eru ógvuliga væl umtóktar, tann fyrra bókin um Rana var eisini mest lænt í 2015; orsøkin er ivaleyst, at hesar bøkurnar eru upprunaføroyskar, tær taka støði í føroyskum viðurskiftum, sum vit kenna, og evnini í bókunum eru viðkomandi, til dømis hjúnaskilnaður, flyting, happing og viðurskifti millum systkin; harumframt eru bøkurnar ikki tjúkkar. At høvuðspersónurin er drongur er eisini ein fyrimunur, í øllum førum hjá dreingjum, sum hava ilt við at lesa bøkur, sum eru ov gentusligar. Bøkurnar um Rana verða nógv brúktar í fimta flokki. Tey, sum lesa ta fyrru, lesa ofta ta seinnu eisini. *Brennivargurin* verður mest lisin í fimta og sætta flokki; hóast henda bókin er gomul, rakar hon enn væl; hon hevur verið millum mest læntu bøkur í nógv ár.

*Gummi-Tarzan* eftir Ole Lund-Kirkegaard verður framvegis nógv lænt; í 2016 var hon fjórð á listanum, í 2014 ovast á listanum yvir mest læntu bøkur í miðdeild. *Eitt løgið skip* eftir Anitu Krumback var eisini nógv lænt í fjør og fyrrárið.



Lis G. í Jákupsstovu, bókavørður á Námi

– *Brúni* eftir Håkon Øvreås er eisini nógv lænt; bókin kom út í 2013 og vann Norðurlendsku barnabókavirðislønina. Hetta er ein serstøk bók um ein drong, sum eitur Rúni; tá ið hann skal vera djarvur, eitur hann Brúni. Bókin er um sorg, herverk, hevnd, happing og annað. Høvuðspersónurin er ein smádrongur, og tað kann vera ein avbjóðing at fáa næmingar at lesa søgur, sum eru um børn, ið eru yngri enn tey. Men lærarar, eg havi tosað við, siga, at henda bókin hevur riggað væl at lesa í miðdeild.

*Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskóginum* eftir Thorbjørn Egner telist eisini millum 10 tær mest læntu bøkurnar til miðdeild í 2016; árið








Mest læntu bøkurnar í 2016 vóru *Rani – ein nýggj byrjan* eftir Ingun Christensen og *Brennivargurin* eftir Jógvan Isaksen




fyri var hon nakað niðari á listanum. Orsøkin er kanska, at søgan varð lisin upp í barnaútvarpinum.

– Hon verður enn nógv lænt, hóast hon er gomul; málsliga er hon avbjóðandi, tí nógv orð í bókini verða ikki nógv brúkt longur. Næstan á hvørjum ári telist hon millum tær mest læntu. Hon verður mest lisin í fjórða flokki. Uppgávur eru til hesa bókina.

### Somu bøkur ganga aftur

Hvat tað er, sum ger, at ein bók verður nógv lænt, og at aðrar detta niðurímillum, er ilt at siga. Á skrásetingunum síggja vit, at somu bøkur ganga aftur og verða nógv læntar, meðan aðrar, sum eisini eru góðar, verða lítið læntar. Toppskorarin í fjør, *Rani – ein nýggj byrjan*, varð lænt 15 ferðir í flokssetti í fjør og 12 ferðir árið fyri. Í 2013 vóru tvær bøkur eftir Edward Fuglø, *Poetikus* og *Vampýrella*, nógv læntar, tær lógu báðar ovast á listanum, og tað komst helst av, at bøkurnar høvdu verið við á skeiði, sum Nám hevði fyri lærarum í miðdeild. Hesar eru ikki millum mest læntu í 2015 og 2016.

– Nám eigur flokssett av *Vampýrellu*, *Poetikusi* og *Apoloniu* eftir Edward Fuglø; hesar eru væl egnaðar til miðdeild, men eg veit, at summir lærarar aftra seg eitt sindur at velja myndabøkur sum flokssett. Í hesum bókunum hava myndirnar nógv at siga, søgurnar eru serstakar, og her er nógv, sum lærarin kann fáa burturúr saman við næmingunum.

*Lat eisini meg* eftir Halldóru Dam, sum kom út í 2013, var vælumtókt í 2014 og 2015, men hon telist ikki millum tær mest læntu í fjør. Bókin er um eina gentu, sum er fyri happing. Henda er væl egnað seint í fimta flokki, annars í sætta flokki. *Vikarurin*, *Vinurin* og *Lokaða landið* eftir Helle Thede Johansen verða eisini nógv læntar á hvørjum ári. Hetta eru eisini upprunaføroyskar bøkur. Børnini, sum eru í bókini, ganga í fimta flokki.

*Framhald á næstu síðu*

– Her eru nógv evni at arbeiða við, tær eru ikki so drúgvar, lættar at lesa, og uppgávur eru til allar bøkurnar.

Felags fyri nógvar av bókunum, sum verða nógv læntar sum flokssett, er, at tær verða ikki nógv læntar av næmingum á skúlabókasøvnum. Og øvut, bøkur, sum verða nógv læntar av næmingum á skúlabókasøvnum, verða ikki nógv læntar sum flokssett.

– Bøkur, sum næmingar í miðdeild læna nógv, eru til dømis bøkurnar um Herviliga Henry og bøkurnar um detektivstovuna hjá Lassa og Maiu eftir Martin Widmark, sokallaðu gátubøkurnar. Næmingar eldri enn miðdeild lesa eisini hesar bøkurnar; tað er áhugavert, at hesar, sum eru so vælumtóktar millum næmingar, ikki verða valdar sum flokssett.










### Vilja hava uppgávur

Lærarar venda sær javnan til bókavørðin í Námi og spyrja um uppskot til bøkur at lesa sum flokssett; nógvir lærarar spyrja eisini eftir ljóðbókum til lesiveikar næmingar, og ein spurningur, ið ógvuliga ofta verður settur, er, um uppgávur eru til bøkurnar.

– Lærarum dámar sera væl, at uppgávur eru til bøkurnar; tíverri eru uppgávur ikki til allar bøkur, men eg veit, at lærarar hvør í sínum lagi gera uppgávur. Tað hevði verið framúr, um Nám kundi fingið hendur á hesum uppgávunum og kundi lagt tær út á Snar; navnið á læraranum, sum hevur gjørt uppgávurnar, nýtist ikki at standa, um lærarar ikki ynskja tað, og vit hjálpa fegin við at seta upp, rættlesa og so framvegis. Uppgávur til somu bók frá ymsum lærarum kunnu vera íblástur til uppgávur, sum onkur annar ger; í øllum førum kanst tú gera tær tankar um, hvussu tú kanst arbeiða við bókunum.

– Tað er harmiligt, at vit ikki hava fleiri ljóðbøkur, tí vit vita, at tað er ein stórur tørvur.

Hyggja vit at skrásetingunum yvir læntar bøkur farnu 4 árini, síggja vit, at gamlar bøkur framvegis verða nógv læntar, tað eru bøkur, sum eru komnar út fyri 20-30 árum síðan. Í fjør var tó eitt sindur øðrvísi, tí helmingurin av teimum 10 mest læntu bókunum var yngri enn 5 ár. Lis í Jákupsstovu skilir væl, at so er, tí hesar bøkurnar eru góðar bøkur og væl egnaðar at brúka í undirvísing og sum framíhjálestur.

– Hetta eru mangan søguligar bøkur, so sum *Lítli Páll í Nólsoy* og *Skip í eygsjón*. Í søgu í miðdeild er vanligt at læra um hetta tíðarskeiðið í Føroya søgu, so bøkurnar hóska eisini inn í tvørfakligan samanhang. *Gummi-Tarzan* er nokk so tíðarleys og viðger happing, sum er ein álvarsamur trupulleiki, men í bókini verður tað viðgjørt á skemtiligan hátt. Tað eru framvegis nógvar eldri bøkur, sum hugtaka; hava lærarar góðar royndir við onkrari bók, brúka teir hana aftur og aftur, men eg haldi kortini, at lærarar eru óførir at fylgja væl við í tí, sum kemur út, og velja nýggjari bøkur.

***Summir lærarar læna eisini flokssett til næmingarnar at vera sokallað náttborðsbók, tað vil siga bók at verða lisin sum frílesingarbók; næmingarnir fáa bókina fyrst í skúlaárinum, og so einaferð út á heystið skulu tey verða liðug við hana fyri at kunna tosa um hana í skúlanum.***

### Mest lænt 2013-2016

**2013**
Poetikus, Edward Fuglø
Vinurin, Helle T. Johansen
Vampýrella, Edward Fuglø
Vikarurin, Helle T. Johansen
Brennivargurin, Jógvan Isaksen

**2014**
Gummi-Tarzan, Ole Lund-Kirkegaard
Lat eisini meg, Halldóra Dam
Vinurin, Helle T. Johansen
Brennivargurin, Jógvan Isaksen
Vampýrella, Edward Fuglø

**2015**
Rani – ein nýggj byrjan, Ingun Christensen
Gummi-Tarzan, Ole Lund-Kirkegaard
Mánalýsi, Elin á Rógvi
Lat eisini meg, Halldóra Dam
Vikarurin, Helle T. Johansen

**2016**
Rani – ein nýggj byrjan, Ingun Christensen
Brennivargurin, Jógvan Isaksen
Rani – vár og vónir, Ingun Christensen
Gummi-Tarzan, Ole Lund-Kirkegaard
Eitt løgið skip, Anita Krumbach



